# ØRNU GEN

**ð sponskum blóði, spæla so eru teir beiggjar. føroyskum rokkbólkum, slandi og spælt. Niels konsertir í Reykjavík 48 Pages, ið seinastu Reykjavík og spælt**




at eingin hevur nakrantíð lært hann at spæla gittar, og hann ivast tí í, um hann hevur so stóran førleika at læra frá sær.

Frans greiður frá, at Hann var øgiliga errin av at vera beiggi Niels. Hann minnist ikki Oblivion, men Mold minnist hann væl. Tann tónleikurin sum Niels spældi og lurtaði eftir, høvdu stóra ávirkan á hann. Bólkar sum Metallica og Pearl Jam vóru orsøkin til, at Frans fór at spæla gittar. Hann byrjaði á klaverinum, men skilti skjótt, at man sá nógv kulari út við einum gittara, og tí varð klaverið skift út við dópsgávuna.

## Nógv betur enn vit

Niels sigur, at hann ikki hevur blandað seg so nógv í tónleikin hjá Frans, men hann viðgongur, at hann er errin av yngsta beiggjanum. Tær ferðirnar hann hevur hoyrt, hann spælt, hevur hann undrast á, hvussu dugnaligir bólkarnir hjá Frans eru. "Teir eru nógv betur enn vit vóru, tá vit vóru teirra aldur" sigur Niels. Hann er eisini imponeraður av, hvussu nógv Frans venur. Men tá hann hugsar seg um, so vandi hann ivaleyst líka nógv fyri tólv árum síðan.

## Íslands ferðir

Um miðan oktober vóru 200 í Íslandi og spældu. Fyrst sum upphiting fyri stóra íslendska poppnavnið Trabant á best umtókta spælistaðnum í Reykjavík, Nasa, síðan í fløguhandlinum Smekkleysa og á tí sera eksklusivu barrini Sirkús. Vikuskiftið eftir spældu teir á Grand Rock, sum ein partur at Iceland Airwaves festivalinum. 200 vóru stjørnur og fingu frálík ummælir. Hetta var aðru ferð, at bólkurin var í Íslandi, fyrru ferð var í 2001, og at døma á góðu undirtøkuni, so verður ikki leingi, áðrenn 200 fer aftur til Ísland.

Ferðin hjá 48 Pages og Sic var eitt sindur minnið, eisini hóast báðir bólkar hava verið í Íslandi fyrr. Konsertirnar vóru nógvar í tali, men áskoðaratalið var ikki serliga høgt.

## Víðari út í heim

Frans er tó væl nøgdur við ferðina. "Vit høvdu tað ordiliga stuttligt, og komu í samband við nógvar íslendskar tónleikarar. Vit fingu eisini onkur sambond úteftir, tað eina kvøldið spældu vit í eini barr fyri seks fólkum, men ein av áhoyrarunum var úr Italia. Hon segði, at hon skipar fyri konsertum har og vildi hava 48 Pages til Italia at spæla. Eg veit ikki, hvussu nógv kemur burturúr tí, men vit fara at royna." sigur Frans. Teir møttu eisini einum týskara, sum segði, at pápi hansara átti eitt plátufelag, og um teir sendu honum eina demo, so skuldi hann spæla hana fyri honum.

## At skapa netverk

Niels, ið hevur spælt uttanlanda við fleiri ymiskum bólkum heldur, at tað er øgiliga gott fyri bólkar at sleppa út at spæla, tað er strævið men samstundis stuttligt. Hetta við at tað er strævið, kennir Frans alt til, á konsertferðini spældi hann við bæði Sic og 48 Pages. Hetta vóru níggju konsertir í fýra dagar, og tað var hart. Harumframt var øgiliga kalt í Íslandi, og tí var hann alla tíðina bangin fyri at fáa ilt í hálsin, men tað eydnaðist tíbetur at sleppa undan tí.

Niels sigur, at man ikki skal undirmeta týdningin av at skapa netverk. Hann greiður frá, at nú teir vóru í Íslandi og spældu, hittu teir fólk, sum høvdu hoyrt teir í 2001, og sum søgdu, at tey høvdu bíðað eftir, at teir komu aftur.

Frans heldur, at tað besta við at sleppa út at spæla er, at eingin kennir teg. Tú spælir fyri øðrum enn tínum vinum. Tí eru afturmeldingarnar nógv erligari, tey lurta eftir tónleikinum, uttan at forbinda hann við, um tey dáma teg ella ikki.